# Søga og søgn av Eiði

**Leygardagin verður fyrsta bindið av savni úr Eiðis søgu givið út. Í hesum sambandi verður skipað fyri hátíðarhaldi í skúlanum seinnapartin**

BÓKAÚTGÁVA
*Edvard Joensen*




*Fyrsta bindið í røð um Eiðis Søgu verður lagt fram á samkomu í Skúlahøllini á Eiði leygardagin klokkan 14.00*

Eiði fær nú sína fyrstu savnaðu bygdarsøgu. Tað er Óli Egilstrøð, sum hevur skrivað, og einkjan eftir Óla, Bettemi, hevur í samstarvi við Bókadeild Føroya Lærarfelags lagt til rættis.

Eiðis Kommuna skipar leygardagin fyri hátíðarhaldi í samband við at bókin, ið sum skilst er tann fyrsta í eini røð, kemur út. Lagt verður upp til, at ein nýggj bók við søguni um felagslív á Eiði er ávegis.

Hendan fyrsta bókin, sum við yvirlitslistum og kortmyndum av Eiði, er góðar fýrahundrað blaðsíður, verður nevnd »Úr Eiðis søgu«.

Hetta lítla orðið »úr« er tað, sum ger munin, tá farið verður undir at skriva slíkar søgubøkur. Tí varð bara sagt Eiðis søga, var lætt at funnist at hesum og hasum, sum vantaði ella kanska als ikki hoyrdi til í eini søgubók. Nú ber hinvegin til at fara eitt sindur víðari enn til bókstaviligar staðfestar hendingar og kortini hava skrivað eina bygdarsøgu.

Bókin byrjar við eini drúgvari frásøgn um staðarnøvn á Eiði, soleiðis sum høvunurin minnist tey. Vit ferðast kring bygdina, í haganum á Eiði og suður í Sundalagið, so langt Eiðis Kommuna røkkur. Eisini eitt sindur longri suður fara vit í øðrum sambandi, tá greitt verður frá um landnám og ferðast verður í huganum suður á Írland, suður móti Oyri.

Hesin parturin, sum umfatar staðarnøvnini, er meira at kalla endurminningar, har ymiskt gamalt kemur uppaftur. Eisini eru hendingar í nýggjari tíð knýttar at ávísum staðarnøvnum. Serliga eru tað vanlukkur, sum festar verða at hesum.

Hjá einum, sum vaksin er upp her og bókstaviliga hevur slitið barnaskógvarnar á hesum støðum, er tað forkunugt at fáa øll hesi nøvnini savnað í einum. Eyðvitað tað, tí eg havi ein rímiliga grundaðan varhuga av, at onkur av keldunum hjá høvundanum man vera tann sama, sum undirritaði plagdi at halda seg til, ta tíð tað var.

Kortini má eg siga, at viðhvørt tóktiskt mær, at rutan var eitt sindur øðrvísi, enn hon vanliga plagdi at verða gingin. Lopið varð onkuntíð í so langt frá einum staði til tað næsta fyri síðan líkasum at koma aftur haðar, farið varð frá, og so halda fram eftir vanligum gøtum.

Stuttligt var knappliga at møta nøvnum aftur, sum ein púra hevði gloymt. Helst tí, tey ikki verða brúkt meira, og í fleiri førum eru horvin. Farin undir betong, vatn ella grótkast fleiri teirra. So tíð er uppá at hesi verða varðveitt soleiðis, sum nú verður gjørt. Hinvegin saknaði eg tó okkurt navn, sum vit plagdu at brúka. Tað vil so vera.

Rímiliga drúgv er umrøðan av jarðarviðurskiftum á Eiði, og forvitnisligt er at lesa um skiftið millum Norðurhelvt og Suðruhelvt í Norðanmanshaganum. Nú er tað lætt at taka framaftur, um áhugi skuldi verið fyri tí.

Áhugavert er eisini at lesa um persónar, sum viðgjørdir verða. Til dømis er forvitnisligt at fáa at vita, at kona Páll Fanga giftist eiðismanni nøkur ár eftir, at maður hennara varð farin av landinum.

Óli Egilstrøð var Krusemaður í móðurætt. Haðani hevði hann fingið listaligar gávur, sum hann brúkti til at tekna og mála.

Ofta síggja vit, at listamálarar geva bøkur út við myndum sínum, og hesin møguleikin er eisini nýttur í hesi bókini, har nógva myndatilfarið í stóran mun er málningar og tekningar hjá Óla. Umframt eru eisini fleiri fotomyndir, sum eisini í stóran mun eru rættiliga persónligar. Nakrar eru tó fingnar aðrastaðni. Eitt nú frá Fornminnissavninum.

Máliborðsbløðini við Eiðishaganum, sum eru bæði fremst og aftast í bókini, eru sera hent at hava.

Ymisk er, sum eygað sær, og fólk minnast. Eftir at hava lisið bókina og hugt at myndunum, eru onkrir myndatekstir, sum undirritaði ikki er heilt samdur við, og onkran tekstin kundi ein hugsað sær at lýst staðarnøvn eitt sindur neyvari.

Gingið verður gjølla um staðarnøvnini í bókini. Tó haldi eg ikki, at altíð er skrivað, sum sagt verður lokalt. Heldur er orðabókamál nýtt í summum førum. Tað kann helst vera rætt hjá teimum, sum ikki kenna støðini, men eg vildi tó hildið, at lokalt mál átti at verðið nýtt í slíkum føri.

Um tað er høvundurin sjálvur, ella tað er rættlesarin, sum hava sett hesi nøvnini á, havi eg ikki fingið uppspurt. Men okkurt kundi bent á, at rættlesingin hevur havt ein leiklut í hesum. Einastaðni varð eitt staðarnavn beinleiðis skeivt, men tað rætta varð so brúkt aftur seinni. Slíkt er fyrigeviligt og kann so bara verða hugsað um, tá næsta bind kemur.

Men tó má eg siga, at tað er eftir míni meting ikki rætt at brúka beinleiðis fremmand orð í eisini slíkari bók.

Rættlesarin er suðringur, og tað sæst týðuliga í orðavalinum, sum brúkt verður.

Tað er gjøgnumført í bókin at brúka orðið »báði«, har øll eiðisfólk siga »bæði«. Konsekvent verður skrivað, at tað tl dømis vóru »báði« abbin og pápin, sum gjørdu tað ella tað. Soleiðis verður ikki sagt á Eiði. Har siga fólk »bæði« abbin og pápin. Og tað skuldi eisini verið nýtt soleiðis í eini bók um Eiðis søgu. Hóast hitt eisini er málsliga rætt.

Tí ein bygdarsøga eigur eisini at goyma tey sereyðkenni, sum bygdin gjøgnum tíðina hevur alt. Tá alt verður stílreint og turrgelt bókamál, og eingin dialekt er eftir, er landið fátækt.



*Gamla kirkjan á Eiði*



*Óli Egilstrøð*



# Íbindingargjaldið eigur at lækka



*Í heyst skal umboðsnevndin endaliga taka støðu til uppskotið hjá Jógvani Isaksen um lækka íbindingargjaldið hjá SEV til húsarhald,*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Ein umboðsmonnunum í SEV fyri Klaksvíkar kommunu, Jógvan Isaksen, mælir til, at íbindargjaldið lækkar 20%. Endalig avgerð um uppskotið hjá Jógvani Isaksen verður tikin á umboðsnevndarfundinum í heyst**

ÍBINDARGJALD
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Umboðsmaðurin, Jógvan Isaksen, sum umboðar Klaksvíkar kommunu, legði eitt uppskot fram á umboðsnevndarfundinum hjá SEV fríggjadagin um at lække-og seinni møguliga taka av íbindingargjaldið til sethús.

Uppskotstillarin róð fram undir, at eitt ókeypis íbindingargjald átti at verið veitt kundanum sum ein tænasta, eins oljufeløgini, Shell og Statoil, lata ókeypis tangar til húsahaldið. Í fyrstu atløgu skal íbindingargjaldið lække 20 %, men málið eigur at verða at taka gjaldið endaliga av. Íbindingargjaldið er í dag ásett til 5000 krónur

Hans Tausen Olsen sigur, at SEV-stýrið viðger uppskotið, og endaliga støða verður tikin til uppskotið á umboðsnevndarfundinum í heyst. Verður uppskotið samtykt, lækkar íbindingargjaldið frá 1. januar 2005.

# Fyrsta royndin eydnaðist væl

**-Hetta var besti fundur, eg havi verið á í míni tíð í SEV. Alt gekk eftir ánni, sigur umboðsnevndarformaðurin í SEV, Hans Tausen Olsen, um fyrsta almenna umboðsnevndarfundin hjá SEV.**

OPIN UMBOÐSNEVNDARFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Hans Tausen Olsen var fundarstjóri á fyrsta almenna umboðsnevndarfundinum hjá SEV, og hann letur væl at.*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Fríggjadagin skipaði SEV fyri fyrsta umboðsnevndarfundið, har hurðarnar vórðu latnar upp fyri almenninginum. Seinasta árið hevur SEV verið fyri nógvum ákoyringum um, at stovnurin er ov afturlatin, og á seinasta umboðsnevndarfundið varð tí samtykt at lata hurðarnar upp fyri almenninginum.

Hans Tausen Olsen er umboðsnevndarformaður í SEV, og hann greiðir frá, at fyrsti almenni fundurin eydnaðist ómetaliga væl.

– Hetta var besti fundur, eg havi verið á í míni tíð í SEV. Alt gekk sum eftir ánni, sigur umboðsnevndarformaðurin í SEV, Hans Tausen Olsen.

Hann leggur afturat, at nógvir relevantir og góðir spurningar komu frá áhoyrarunum, og hetta setti sín dám á orðaskiftið fríggjadagin.

### Hægri krøv

Hans Tausen Olsen sigur, at nýggja skipanin setur hægri krøv til SEV-stýrið.

– Nýggja skipanin krevur bæði, at stýrið og fundarstjórin eru betri fyrireikað til fundirnar. Vit hava gjørt av, at halda tíðindafund fyri fjølmiðlunum, áðrenn hvønn umboðsnevndarfund, og tað setur eisini hægri krøv okkum. Persónliga kann eg bert siga, at eg nýtti meir til at fyrireika meg, enn eg havi gjørt áður, sigur Hans Tausen Olsen.

## 20. modellskipið hjá Hans Jacob



*Modellið av Løvenørn verður við á framsýningini, sum norðoya Listafelag hevur á norðoyastevnu*

Hans Jacob Fuglø fer at sýna fram eitt modellskip á norðoyastevnu. Hetta er 20. modellið, sum hann hevur bygt

Eftir einari tekning frá miðskeiðis í 19. øld. Skipið varð bygt í 1848, og í 1874 keyptu Jørgen Bech og sønner, sum róku handilin úti í Klaksvíksgarðinum, tað. Skipið varð nýtt til at føra vøru millum úthandlarnar. Síðani varð tað nýtt sum fiskiskip, og tann 25.05.1887 fór tað á land í Íslandi. Hetta hendi við Breiðuvík í illveðri. Allir menninir lótu lív.

Hans Jacob fekk fatur á hesari tekningini, og eftir henni gjørdi hann so modellið av skipinum.

Arbeiðið tók hálvt ár. Og nú hevur tað staðið liðugt somuleiðis í eitt hálvt ár.

– Eg havi gjørt mong modell, hetta er nummar 20 í røðini, og tá telji eg ikki byggisettini við, tí tey eru ikki tað sama, sigur Hans Jacob.

Hans Jakku Fuglø hevur fyrr sýnt fram saman við norðoya Listafelag, og tað dámar honum væl. Men hann sigur, at hann fæst mest við skip, sum eru søgulig. Og um norðoyastevnu fer hann so at sýna fram sítt seinasta og nýggjasta modellskip.

## Glotti og Gleimi á norðoyastevnu



Stórt barnatiltak í KÍ-høllini fríggjakvøldið kl 18.30.

Aftur í ár, verður skipa fyri stórum barnatiltaki á Norðoyastevnu. Seinasta ár, vóru 3 sýningar í gomlu fimleikarhøllini á Ziskatrøð skúlanum, men í ár er tiltakið flutt niðan í KÍ-høllina.

Av tí at undirtøkan var framúr góð í fjør, hava fyrireikararnir valt at hava tiltakið í KÍ-høllini, í ár.

Á skárnni verur búktaling og gykl frá Glotta & Gleimi, umframt at Hans Michael og Finn fara at syngja og skemta við børnunum.

Kostnaður fyri tiltakið er 80 kr, og kunnu atongumerkini keypast við dyrnar.

## Konsert í skúlanum við Ósánna



Komandi týskvøld kl. 19.30 hava 17 Sangarar konsert í Ósáskúlanum, har tey fara at syngja føroyskar og norðurlendskar fosturlandssangir, nakað av andaligum sangum og okkurt klassiskt.

Eisini verða klassisk stykki og lættari tónleikur framførd á violin og klaver við Moniku Stauss Joensen og Helgu Hilmarsdóttir Gerðalíð.

Í samband við at kórið var á konsertferð í Sveits í seinasta mánað, har væl vitjaðar konsertir vórðu hildnar bæði í suður- og norðursveits, er eisini ætlanin at vísa nakrar myndir frá ferðini.

Kórleiðari verður sum vanligt Jógvan við Keldu, meðan Pætur við Keldu hevur klaverfylgispælið.

Tað eru í ár liðin 10 ár síðani 17 Sangarar vórðu settir á stovn.